# UMSJÓNARFÓLK

Hervið verður søkt eftir húsavørði til Vestmanna Skúla og Ítróttar-høll at arbeiða við dagligari røkt av bygningum og umhvørvi.

**Arbeiðsuppgávur**
Saman við starvsfeløgunum at hava um hendi dagligu røktina av Vestmanna Skúla og Ítróttar-høll.

Umhvørvið uttan um bygningarnar er ein sjálvsagdur partur av arbeiðinum.

Vaktarskipan, sum leiðandi húsavørðurin hevur ábyrgdina av, er partur av dagligu arbeiðsgongdini.

**Førleikakrøv**
Vit sóknast eftir fyrikomandi fólki, sum dugir at arbeiða sjálv-støðugt og verða partur av einum toymi við trimum fólkum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og hevur tilvísing til leiðandi húsavørðin.

Lønar- og setanaðarviðurskifti eru við avvarandi yrkisfelag.

Starvið verður sett frá 1. september 2007 at rokna ella skjótast gjørligt aftaná.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Helgi Finn Poulsen, leiðandi umsjónarmann, á tlf. 230107.

Umsókn saman við møguligum prógvi og viðmælum skal sendast til Vestmanna Kommunu, Bakkavegur 16, 350 Vestmanna.

Umsóknin skal verða Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi 13. august 2007, kl. 12.00.

Vestmanna Kommuna skilar sær rætt til frítt av velja ímillum umsøkjararnar ella ongan at velja.

VESTMANNA KOMMUNA

## Sandoyar Meginskúli
210 - Sandur

**Søkt verður eftir 2 lærarum**
· einum í fulltíðarstarv skúlaárið 2007/08
· einum í parttíðarstarv skúlaárið 2007/08 at lesa avlopstímar (endaliga tímatalið verður ikki greitt fyrr enn 1.septembur 2007)

Fyrimun hava tey, sum kunnu undirvísa í:

Alis/evnafrøði og støddfrøði

- og sum hava læraraútbúgving, hava góð samstarvsevni, eru opin og kreativ, og vilja vera við til at menna skúlan

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Meira fæst at vita um størvini við at seta seg í samband við skúlastjóran, Elnu Skylv Hansen, á tel. 211619.

Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin **10. august á middegi,** við posti ella t-posti.



## Pedagogur til Frítíðarskúlan Smílibýlið

Vit í Smílibýlinum søkja eftir einum dugnaligum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna. Tú byrjar at arbeiða 13 august ella eftir nærri avtalu.

Í Smílibýlinum ganga 49 fitt børn, og vit hava 5 dugnalig fólk í starvi.

**Vit vænta at tú:**
• Dugir at arbeiða sjálvtøðugt og tekur ábyrgd.
• At tú ert arbeiðsamur og dugir at vísa umsorgan.
• Og so hevði tað verið gott, um tú hevur humor.

**Okkara gerandisdagur er soleiðis:**
Vit heinta børnini tá tey hava frí. Tá børnini koma í frítíðarskúla, eta tey matpakka, og síðani fara vit og børnini í gongd við ymiskt virksemi.
Vit vilja fegin geva børnunum frælsi undir ábyrgd.
Talan er um frítíðina hjá børnunum. Tí eru spæl og annað virksemi sjálvboðin, tó undir okkara ábyrgd og hjáveru.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja til Barbaru Dahl leiðara tlf. 214879 ella Joan Heinesen á tlf. 210646.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Frítíðarskúlan Smílibýlið
Stoffalág 82
100 Tórshavn

**í seinasta lagi 06 august 2007.**

Tórshavnar kommuna

## Søkt verður eftir fólki til alingina í Suðuroy

Talan er um 2 fulltíðar størv, at seta skjótast gjørligt. Arbeiðið fevnir bæði um røkt av fiskinum og at verða saman við ábyrgdarhavandi fyri tekniska partinum av alingini.

Maskinkunnleiki og stóra koyrikorti er ein fyrimunur, men ikki ein treyt fyri at søkja starvið.

Vit vænta at tú ert sera arbeiðssamur, nær lagdur og árvakin í tínum arbeiði, tá hetta eru fremstu eginleikarnir hjá einum góðum alara.

Lønin verður avtalað millum leiðslu og umsøkjara.

Um hetta ljóðar áhugavert, ert tú vælkomin at søkja starvið við at senda eina umsókn til.



**P/F Faroe Farming**
Postbox 97 • FO-900 Vágur • Tlf. 374325
*ella ringja til Erhard á tlf. 221447 og frætta nærri*

## Frítíðarbátur til sølu



**Finmar Commander 700**
Árgang 1978, gps, ekkolod, sjálvstýrara, WC, 2 gasblus, vask, oljufýring, cd spælara, 130 hk. Volvo Penta dieselmotor við 280 drevi, ferð umleið 17 míl, prísuppskot 239.000 kr.
**Tlf. 217614 / 311014**

## Ellisakfar til sølu

**Opel Kadett árg. 1978**

**Áhugaði kunnu ringja á tlf. 315272**



## JA, NÚ VERÐUR HANN SO!

***Hvør?** Jú, tann vælumtókti urðardansurin verður við bátahylin í Kvívík leygardagin 25. august*

Byrjað verður kl.15 við tombola við 200 vinningum og fiskibrunni, hoppiborg og barnaróður verður um viðrar

Harmonikir hita upp til dansin frá kl 21.00
LM-Band spæla til dans frá kl. 22.00

Eisini hava vit pylsuvogn.
Vit fara eisini at steikja búffar á opnari grill

**Komið og havið eitt gott kvøld/nátt í Kvívík**

**KSR og Bygdarfelagið Glæman**



# LOYSNIN!

**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**

**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**

**Vit eru serkønir í at gera:**

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
**TEL 310 411 · FARTEL 215 411**
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo